# Pengar dríva ikki verkið hjá Jan

**HONDBÓLTUR** Ungi venjarin hjá KÍF valdi at gerast venjari í Føroyum, fyri at fáa eina øðrvísi uppliving. Hann hevur bevíst valt at satsa uppá ungar spælarar, tí uttan teir verður eingin menning í føroyskum hondbólti

Heri Simonsen



Jan Ottosen er 33 ára gamal, og hann kemur úr Thy í útnyrðingspartinum av Jútlandi.

– Eg samanberi ofta Thy við Føroyar. Vit hava Thisted, har eg búði í 12 ár, áðrenn eg flutti til Føroya. Thisted er á støðd við Havnina. So hava vit fiskivinnubýin, Hanstholm, og eg haldi, at hann kann samanberast við Klaksvík. Og so hava vit nógvar smærri býir og bygdir, eisini Mors, har eg vaks upp. Mors minnir nógv um Kollafjørð í støðd, so í støðd minnir Thy nógv um Føroyar, greiðir Jan Ottosen frá.

Hann hevur lagt tað soleiðis til rættis, at hann kemur at halda jól í Thy, tí sum hann sigur.

– Eg vil gjarna hava matin hjá mammu.

### Vildi sleppa uttanlands

Spurdur um, hvussu hann kom í samband við Føroyar og føroyskan hondbólt, greiðir Jan soleiðis frá.

– Tað er ein rættiliga stuttlig søga. Eg kenni væl René, sum var hondbóltsvenjari í Føroyum um aldarskiftið. Vit vóru so nakrir, sum sótu og prátaðu eitt kvøldið, hvat vit kundu hugsa okkum at roynt sum venjarar. Tá sigi eg, at eg kundi gott hugsa mær at sloppið ein túr uttanlands, um tað so gjørdist í Týsklandi, Svøríki, Noregi ella onkra aðrastaðni var líkamikið. Eina viku seinni ringdi Jákup Dam, sum tá var formaður í KÍF – hetta var eitt ár áðrenn eg kom í starv, sum venjari hjá KÍF . Eg fór so til Føroya, og tá sá eg ein dyst millum KÍF og VÍF, sum KÍF vann. Vit tingaðust so um eg skuldi byrja hetta kappingarárið, men tað bleiv ikki av nøkrum tá. Áðrenn seinasta kappingarár ringdi Árny, sum tá var kassameistari til mín, og spurdi um eg kundi hugsað mær at verða venjari hjá felagnum. Hon gava mær eitt tilboð frá felagnum, og eg segði við meg sjálvan, at eg skuldi taka upplivingina. Tað eru ikki pengarnir, sum gera, at eg eri hondbóltsvenjari. Eg kann liva av tí, og eg fái eina stóra uppliving, sigur hann.

### Satsar uppá ungar spælarar

Jan satsar tilvitað uppá ungar spælarar í KÍF.

– Tað eri eg noyddur til. Um tú ætlar at menna føroyskan hondbólt, so er tú noyddur at hyggja eftir tínum egnu spælarum. Eg kundi gott fingið fatur á einum donskum spælara, sum hevði kunnað skorað 15 mál í hvørjum dysti, men ein slíkur kostar nógvar pengar, og tey føroysku hondbóltsfeløgini hava ikki so nógvan pengar. So hví ikki menna sínar egnu spælarar? Um tú hyggur trý ár fram í tíðina, so er tað so einfalt, at fær tann útlendski spælarin ikki sína løn, ja, so er hann farin av landinum, staðfestir Jan.

– Sum er fær eingin av spælarunum hjá KÍF pengar fyri at spæla hondbólt. Teir spæla við hjartanum, sum eg haldi er tað týdningarmesta. Tað hevur so ført til, at KÍF – kanska – í ár kemur at spæla í FM-finaluni. Men tað merkir eisini, at teir kunnu koma at spæla um FM-finaluna mong ár framyvir. Hetta letur seg gera, tí vit hava so nógv ung talent, slær Jan fast.

### Áhugin er stórur í Kollafirði

Jan ásannar, at tað merkist í Kollafirði, bæði tá tað gongur við, og tá tað gongur ímóti hjá KÍF.

– Tað eru mong, sum vilja práta um hondbólt. Ìfjør spældu vit ein stevnudyst ímóti VÌF um kvøldið, sum vit vunnu, og øll bygdin var uppi at koyra, tí vit høvdu vunnið hendan dystin. Men so byrjaði kappingarárið, og vit taptu fimm teir fyrstu dystirnar, tá bleiv tað ikki tosað so ræðuliga nógv um hondbólt. Men aftaná vit vunnu dystin í Vestmanna í sætta umfari í farna kappingarári, so hevur verið tosað um hondbólt hvørt vikuskiftið í Kollafirði. Men tað er bara stuttligt, at bygdarfólkið kennir seg sum ein part av KÍF, slær Jan Ottesen fast.

### Flest áskoðarar

Og áhugin sæst aftur á áskoðaraplássinum, staðfestir Jan:

– Vit eru tað felagið, sum hevur flest áskoðarar. Vit hava 300 áskoðarar til allar dystirnar vit spæla, og tá kann tað gera tað sama, um vit spæla á heimavølli ella á útivølli. Vit hava, ið hvussu er 150-200 trúgvar áskoðarar. Og fyri, at tey skulu kenna, at hetta er eisini tykkara lið, so má ein minnast til at geva sær tíð at práta við tey, sigur hann.

Jan Ottosen brennir fyri hondbóltinum, bæði uttanfyri og innanfyri vøllin.

Í jólagávu ynskir hann sær, at KÍF staðfestir 2. plássið, og heldur tað aftaná nýggjár.

heris@sosialurin.fo

